Ferðavinnufelagið

Tórshavn 20. oktober 2020

Til vinnunevndina

Viðv. løgtingsmál nr. 22/2020:

Tann 25. august sendi Ferðavinnufelagið eitt skriv til Helga Abrahamsen, landsstýrismann har felagið kom við viðmerkingum til heimildina hjá landsstýrismanninum at steingja matstovur orsaka av Covid-19. Tann viðmerkingin er ein partur av hesum máli, og har heitti Ferðavinnufelagið staðiliga á politiska myndugleikan at bíða so leingi sum møguligt við einum slíkum átaki, og tað gera vit framhaldandi. Verður smittustøðan so álvarslig aftur, at neyðugt er at seta hesar avmarkingar í verk aftur, so verður mælt til at gera tað í eitt so stutt tíðarskeið sum møguligt.

Í lágárstíðini, sum vit í ferðavinnuni eru í beint nú, liva matstovur og gistingarhús næstan burturav av, at føroyingar fara út at eta og hugna sær og av privatum tiltøkum. Hesi tiltøk eru væl skipað og lagt verður upp til, at øll tilmæli frá heilsumyndugleikum verða hildin.

Vit í gistingarhús- og matstovuvinnuni hava lært okkum at liva við verandi støðu, og vit duga at skipa tiltøk undir tryggum og skipaðum umstøðum, við serligum atliti at reingerð og frástøðu.

Avmarkingarlóggávan kann lættliga gera tað, at tiltøk verða hildin undir óskipaðum umstøðum. Gistingarhús og matstovur hava hølir, umstøður og førleika til at klára at halda tilmælini frá heilsumyndugleikunum.

Ferðavinnufelagið vil tí heita á løgtingi um at hugsa seg væl um, tá ið talan verður um at leingja avmarkingarlóggávuna. Skuldi smittustøðan versna nógv aftur, verður mælt til at matstovur og gistingarhús ikki verða fevnd av somu avmarkingum sum eitt nú barrir. Tað er sera løgið, at man blandar matstovur og barrir saman í somu reglugerð og leggur upp til at matstovur og barrir fylgja somu reglum.

Ikki tykkum at siga, so er tað sera stórur munur á at fara á eina barr og eina matstovu. Á einari barr standa fólk ofta uppi og í fleiri førum tætt saman og á einari matstovu, sita fólk saman sum pør, vinir og/ella familjur og njóta ein betri bita. Hesi bæði tingini mugu og kunnu ikki blandast saman, tað er hvør sítt og skal avgjørt ikki verið fevnt av somu reglugerð. Vit vilja tí staðiliga heita á tykkum um at skilja tingini at.

Seinst avmarking var sett í gildi, skuldu matstovur lata aftur kl. 22.00 – hettar er ov tíðliga um man skal klára at koyra 2 sokallaðar seatings, har tann fyrsta vanliga byrjar kl. 19.00 og tann næsta uml. kl. 20.30. Tað tekur áleið 2-3 tímar at koyra hvørja seating, og tískil vil kl. 22.00 verða ov tíðliga at lata aftur.

Vinarliga
FERÐAVINNUFELAGIÐ

Henny á Líknargøtu, formaður
Árni Olsen, næstformaður

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo